


*Shinkai Maru og Sea Star á Havnini - svartkjaftur og olja!*

# Prógvið um ein skilagóðan vinnulívspolitikk

*-Vit mugu alla tíðina kanna møguleikarnar fyri lønandi vinnu í framtíðini, og besta prógvið um skilagóðan vinnulívspolitikk hjá hesum landsstýrinum eru royndirnar og kanningarnar umborð á teimum báðum skipunum Shinkai Maru og Sea Star.Við at lata hesi bæði skipini kanna møguleikarnar at fáa lønandi vinnu burtur úr størsta fiskastovni okkara, svartkjaftinum og at kanna møguleikarnar fyri at kunna fara undir eina oljuvinnu her á landi hevur landsstýrið víst, at tað hugsar ikki um løtuvinning men leggur dent á at slóða fyri komandi vinnulívsmøguleikum her á landi sigur Tummas Arabo, landsstýrismaður í sambandi við, at Shinkai Maru og Sea Star vóru á Havnini í farnu viku. Hann vitjaði umborð á teimum báðum.*

Tá Tummas Arabo var umborð á Shinkai Maru í farnu viku kom amerikanska seismikkskipið Sea Star á Havnina. Landsstýrismaðurin nýtti eisini høvi til at vitja har umborð. Hetta skipið er eisini boðsent av landsstýrinum at koma til Føroya at gera kanningar í sambandi við olju og gass.

## Shinkai Maru og Sea Star prógv um skilagóðan politikk

Tummas Arabo sigur, at júst hesi bæði skipini, eru besta prógvið um, at landsstýrið hevur ein skilagóðan, miðvísan og langsiktaðan vinnulívspolitikk. Japanska Shimkai Maru hevur fingið til uppgávu at kanna, hvussu lønandi vinna kann fáast burtur úr einum fiskastovni, sum vit í dag lítið og einki gera við til annað enn at brúka sum býtisfisk. Sea Star hevur fingið til uppgávu at kanna, um møguleikar eru til staðar at finna olju og gass í føroysku undirgrundini.

-Eg haldi, at myndin av hesum báðum útlendsku skipunum, sum skulu kanna tilfeingi í okkara havøki og tilfeingi í okk-

ara undirgrund, er besta dømið um vinnulívspolitikkin, sum hetta landsstýrið hevur rikið.

Fyri bæði tvey eru galdandi, at talan er ikki um løtuvinning. Talan er um at vit saman við øðrum og við neyvum fyrireikingum og skipaðum kanningum, kunnu fáa lønandi vinnu burtur úr tilfeingi bæði í okkara sjógvi og okkara undirgrund.

-Eg veit væl, at val verður í næstum, og at onkur kann útleggja hesi orð míni sum valpropaganda. Tað er tað ikki. Talan er um ítøkiligar veruleikar, og eru skipini við Havnar kei haldbesta prógvið um hetta. Men lat meg so leggja afturat, at hevði sambandsflokkurin sitið við valdinum í Tinganesi, so vóru hesi skip ikki komin henda vegin.

### Pauli og Edmund ongan langsiktaðan vinnulívspolitikk

Minnist meg rætt, so var tað nettup Pauli Ellefsen, táverandi løgmaður, sum ikki vildi taka av einum tilboði frá japonskum felag um at loyva royndarskipi at fiska og viðgera svartkjaft her.

Og líta vit so at oljupolitikkinum hjá eftirmanninum Edmund Joensen, so hevur hann verið og er, at vit skulu als ikki gera nakrar kanningar hesumegin aldarskiftið. Tær skulu bíða til marknatrætan við bretar er loyst.

Eg veit ikki, hvussu leingi vit skulu bíða við at kanna møguleikarnar fyri at troyta svartkjaftin og møguliga olju! Men var tað upp til sambandsflokkin, so varð bíðað til deyðin stóð í durunum. Javnaðarflokkurin í landsstýrinum, sum umsitur bæði fiskatilfeingi og møguligt oljutilfeingi hevur tað greiðu áskoðan, at vit alla tíðina eiga at arbeiða skipað og miðvíst við at kanna møguleikarnar - mótvegis bara at bíða ella bara at satsa upp á løtuvinning.

Tummas Arabo sigur, at ein orsøkin til, at støðan í landinum er soleiðis sum hon er, er tann, at alt ov nógv projekt eru koyrd ígjøgnum uttan at hava verið nóg væl kannað.

Og fyri ikki at enda í hesi støðu aftur hevur tað verið miðvísi politikkurin hjá landsstýrinum seriøst at gera tær neyðugu kanningarnar. Og her eru svartkjaftaroyndirnar hjá Shinkai Maru og seismisku kanningarnar hjá Sea Star besta prógvið.

jan

## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**Torsdag den 11. aug. 1994, kl. 11.20**

tvangsauktion, (AS 839/93) over matr. nr. 56 d, Kirkjubø beliggende Garðsgøta 1, Argir.

Auktionen er begæret af advokat Fríða Patursson, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 1.1145 (j. nr. 931129) på vegne en pant- og udlægshaver

Ejendommen er et beboelseshus på en 510 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 154 kvm. i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på Dommerkontoret.

**Færøernes fogedret**, den 21.06.94
**Mette Søgaard-Nielsen**
dfm.

JUBILEUMS ÚTSØLAN HELDUR FRAM
EIN ØRGRYNNA AV TILBOÐUM
1964 1994 marstein 30 ÁR
Føroya størsta og besta úrval ! t.d.
ORKUSPARING!
Nú er tíð at skifta teir gomlu orkuoyðslararnir út við heimsins mest orkusparandi frystiboksir...




VANLIG BOKS:
HF 141 Prísur 3.450,- JUBILEUMSPRÍSUR 2.695:-
LÁGORKUBOKSIR:
SB 140 Prísur 4.510,- JUBILEUMSPRÍSUR 3.140:-
SB 200 Prísur 4.670,- JUBILEUMSPRÍSUR 3.325:-
SB 250 Prísur 4.790,- JUBILEUMSPRÍSUR 3.450:-
SB 300 Prísur 5.040,- JUBILEUMSPRÍSUR 3.575:-
SB 400 Prísur 5.630,- JUBILEUMSPRÍSUR 3.950:-
SUPER LÁGORKUBOKSIR:
SE 215 Prísur 5.380,- JUBILEUMSPRÍSUR 3.940:-
SE 255 Prísur 5.600,- JUBILEUMSPRÍSUR 4.100:-
SE 325 Prísur 6.260,- JUBILEUMSPRÍSUR 4.590:-

Vestfrost
Lágorkufrystiboksir, t.d. modell SE 215
4-stjørnað frystiboks við heimsins lægstu orkunýtslu - bara 0,50 kWh um samdøgrið.
Modell SE 215, ið tekur 206 litrar av frystivøru, frystir 30 kg. um samdøgrið - og um streymurin fer, tekur tað heilar 54 tímar at tiðna vøruna úr ÷18 til ÷9º C.
Hon hevur 2 kurvar, praktiskt skiljirúm, ið kann brúkast sum bakki til tiðningarvatnið í samband við frárenslið í botninum á frystiboksini.
Kontrollpanelið uttaná, hevur barnatryggjaðan termostatknøtt.

| Frystiboksir | | HF141 | SB140 | SB200 | SB250 | SB300 | SB400 | SE215 | SE255 | SE325 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka/ltr. brutto/netto | | 134/125 | 140/133 | 198/189 | 257/247 | 296/284 | 384/368 | 213/206 | 247/239 | 323/312 |
| Streymnýtsla kWh um samdøgrið | | 1,10 | 0,60 | 0,69 | 0,77 | 0,85 | 1,05 | 0,50 | 0,55 | 0,65 |
| Kurvar | | | 1 | 2 | 2 | 3 | 4 | 2 | 3 | 4 |
| Mát í cm: | Hædd: | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 |
| | Breidd: | 55 | 72 | 92 | 112,5 | 126 | 156 | 112,5 | 126 | 156 |
| | Dýpd: | 63 | 65 | 65 | 65 | 65 | 65 | 65 | 65 | 65 |

Vit útvega eisini størri boksir - vælegnaðar til stampar o.t.
Altíð lægstu prísir - og bestu tænastu
marstein 30 ÁR
DISCOUNT
Skjót útveganring og fá eitt prát við okkum...
marstein
Árvegur. Tlf. 11300 11305

Sosialurin — fimm ferðir um vikuna!